


*Fremsti partur av áskoðarunum á Vágsbøi kókaði, tá The Rasmus spældi Mynd: Álvur Haraldsen*

**Høvuðsnavnið á Summarfestivalinum fríggjakvøldið, finski The Rasmus, spældi eina fína konsert, ið veruliga fekk økið frammanfyri pallin á kók.**

Summar FESTIVALUR

Niels Uni Dam
nielsuni@sosialurin.fo

Finski rokkbólkurin The Rasmus kom rættiliga væl frá framførsluni fríggjakvøldið á Vágs–bøi. Alla konsertina hevði The Rasmus væl fatur á fremstu áskoðarunum, men av tí at annleggið als ikki maktaði stóra økið, og ljóðið tí var ov spakuligt frá, rokkaði allur Vágsbøur ongantíð veruliga, fyrr enn hittið In the Shadows fekk lív í øll.
Ljóðið var annars rættiliga gott hjá bólkinum. Her er talan um ein væl samanspældan og toppproduseraðan bólk, ið longu hevur spælt eina langa konsertferð, og við egnum dugnaligum ljóðmanni ljóðaði alt flott, men tað gjørdist ongantíð veruliga fantastiskt.
Tónleikurin er melidiøsur rokkur, rættiliga poppkent tó við greiðum ávísingum til 80'ára rokkin, har serliga gittarspæli var dekan ov 80'ára kent. Hæddarpunktini vóru hittini Sail Away, No Fear og In The Shadows, meðan eisini løg sum Bullets og Keep Your Heart Broken, eisini riggaðu serliga væl.
The Rasmus spældi væl, og hóast sangarin ikki telist millum heimsins bestu, so hevði hann jaliga útstráling, og fekk gott lív í fólk. Haldi tó, at sangskrivingin var eitt sindur ivasom í støðum. Nógv av løgunum tyktust stutt sagt ikki nóg sterk, tó vóru nógv undantøk.

# Sjarmerandi Sarah legði fyri

**Konsertin hjá Saruh Brendel var ikki millum størstu upplivingarnar á Summarfestivalinum, men týska songkvinnan var sera sjarmer andi.**

Summar FESTIVALUR

Niels Uni Dam
nielsuni@sosialurin.fo



*Sarah Brendel gjørdist ongantíð betur enn miðalhampa Mynd: Álvur Haraldsen*

Tað var týska Sarah Brendel, ið fekk heiðurin at lata stóra pallin á Summarfestivalinum upp. Ein stór uppgáva. Konsertin gjørdist ongantíð meira enn miðal hampað, og eg siti eftir við tankanum, kanska er Sarah Brendel bara ikki betur enn tað sama.

Løgini sum Sarah framførdi við bólki sínum kunnu, um man ynskir at vera heilt fýrkantaður býtast í tveir bólkar, eitt sindur bygdasligur amerikanskur rokkur og eitt slag av friðarligum balladum. Balladurnar vóru hvørki sterka síðan hjá bólkinum ella hjá Saruh, og vóru hesar dekan ov nógvar í tali, tað var bara ikki feitt. Bólkurin megnaði ongantíð at kína ljóðførunum nóg yndisliga til at hetta riggaði, meðan Sarah onkursvegna ikki megnaði at syngja hetta nóg yndisligt.
Hin vegin vóru rokkløgini munandi meira sjarmerandi, klæddu rættiliga væl fittligu Saruh, ið sjálv var sera sjarmerandi. Hesi løg vóru bygdaslig uppá tann góða mátan.
Bólkurin hjá Saruh er rættiliga nýggjur, og teir spældu ikki heilt best, har var dekan ov óruddiligt í ljóðmyndini í støðum. Ljóðið var sum heild rættiliga ringt á konsertini, Sarah hevði ikki egnan ljóðmann við, og føroyski ljóðmaðurin megnaði ikki uppgávuna at fáa risa stóra anleggið at ljóða so væl sum tað átti.



## Føroyska veðrið er ringt fyri umdømið

Føroyska veðrið ávirkaði Summarfestivalin, men mjørkin í Vágum órógvaði eisini á annan hátt. The Rasmus skuldi leygardagin spæla á Ankkarock festivalin í Vantaa í Finnlandi, men bólkurin slapp ikki úr Føroyum fyrr enn út móti sunnumorgni. Tí var konsertin leygarkvøldið fyrst avlýst og síðan flutt til sunnudag seinnapart.
Á heimasíðuni hjá Ankkarock fekk umtalan av føroyska mjørkanum nógv pláss, og hevur tí uttan iva vakt ans millum nógvu gestirnir, fjølmiðlarnir og hinar bólkarnir, ið luttóku á festivalinum.
Heldur ikki Maggie Reilly, FR David og Sarah Brendel sluppu úr Føroyum til tíðina.
Tað er ikki óhugsandi, at tað er óheppið fyri umdømið hjá Føroyum sum festivalland, at so nógv fólk verða noydd at bíða eaftir floglíkindum. Hetta er triði stóri festivalurin, sum verður raktur av truppulleikum við flogviðurskiftunum í summar, og við heimsnøvnum, ið vitja Føroyar mitt á eini konsertferð, kunnu flogviðurskiftini í framtíðini gerast avgerandi, um bólkurin vil okkara fjarskotnu klettar.

*nud*



*The Rasmus kavaði saman við kavarum frá Faroe Dive Mynd:Faroe Dive*

## The Rasmus kavaði á Viðareiði

Tá útlendskir tónleikagestir vitja her á klettunum í sambandi við festivalar verður ofta gjørt nógv burturúr, fyri at teir kenna seg væl, og fyri hædd verður tikin fyri teirra serstøku ynski. Finski bólkurin The Rasmus, hevði eitt serstakt ynski á ferð síni í Føroyum, og tað var at sleppa at kava í føroyskum sjógvi. Fríggjadagin skipaðu fyrireikararnir av Summarfestivalinum saman við Faroe Dive fyri kaving norðuri á Viðareiði niðanfyri kirkjuna. Kavingin gekk væl, og tónleikararnir vóru væl nøgdir við kavingina. Hóast hetta var fyrstu ferð at limirnir í The Rasmus kavaðu so norðalaga og í køldum sjógvi vóru kavaraleiðarnir hugtiknir av, hvussu væl kavararnir kláraðu seg.

*nud*